# Torkil keypt Gunnleiv á Landavegnum

**Tað gekk ikki lang tíð at fáa selt handilin hjá Gunnleivi við Landavegin. Handilin bleiv lýstur til sølu í farnu viku, og hann er longu seldur. Keypari er Torkil við Sandá.**

HANDILSKEYP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Torkil við Sandá hevur keypt handilin hjá Gunnleivi við Landavegin, og hann fer at halda fram í sama stíli, sum tað hevur verið frammanundan.*

*Myndagerð: Álvur Haraldsen*

Torkil við Sandá vil ikki siga nakað um, hvussu nógv hann hevur keypt handilin hjá Gunnleivi fyri, men hann sigur tó, at bæði keypari og seljari eru nøgdir.

### Heldur fram á sama hátt

Spurdur hvørjar ætlanir, ið hann hevur við handlinum, sigur Torkil við Sandá:

- Tað er meiningin, at vit halda fram í sama stíli. Vit yvirtaka handilin við ársskiftið, og tað er tí eisini avmarkað, hvussu nógvar broytingar vit fáa framt til tað tíð, men vit ætla tó at gera handilin meiri kundavinarligan, sigur Torkil við Sandá.

Keypið umfatar ikki bara sjálvan handilin, men eisini alt húsið, ið handilin húsast í. Umframt handilshølini er eisini talan um eina stóra íbúð.

Torkil við Sandá sigur, at sjálvur hevur hann ikki nakrar royndir innan handilsvirksemi, men tað eru hann og konan, sum saman hava keypt, og konan hevur drúgvar royndir frá handli.

# Tvey fólk brunnu inni

**Sørvágur er í djúp-ari sorg eftir at eldur kom í eini eldri hús í bygdini í mánakvøldið. Tvey fólk lótu lív inni í húsinum, helst orsakað av roykeitran.**

ELDUR
*Snorri Brend*

**Sørvágur:** Løgreglan fekk boð um eldin um hálvgumtíggju tíðina í mánakvøldið. Løtu seinni vóru sløkkiliðini í Sørvági, Miðvági og tað á flogvøllinum við húsini.

Eldurin var ikki tann stóri, og tí eru húsini ikki brunnin í grund. Men hóast hetta so kravdi eldsbrunin kortini tvey mannalív.

Í húsunum búði ein eldri kvinna fyrst í áttati-árunum saman við syni sínum, sum er í seinnu helvt av fimmti-árunum. Hesi vóru einastu fólkini í húsinum.

Løgreglan í Vágum upplýsir, at eldurin eftir øllum at døma er kyknaður í einum kamari í kjallaranum.

Hann hevur síðan helst tikið í bjálvingina, og hagani breitt seg kring um í húsinum, við útviklingi av sera nógvum royki. Talan er mest um royk- og vatnskaða í húsunum.

Tað er tí uttan iva hetta sum er orsøkin til at tey bæði fólkini, sum í húsinum vóru, lótu lív.

SKEMTilig móttøka

miðlahúsið
í Vágsbotni

Fríggjadagin 2. desember kl. 16 verður nýggjasta útgávan av Skemt við tekningum hjá Óla P framløgd í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Skemt 05 er nakað fyri seg. Hon er meira enn bara 17. bókin í røðini av Skemtbókum. Talan er um eina víðkaða útgávu, nú teknarin fyllur 70 ár í januar mánaði.

Óli P verður hjástæddur og signerar bøkur. Okkurt jólaligt og hugnaligt verður eisini í Miðlahúsinum henda dagin. Øll eru vælkomin.




Sosialurin 341800